Einasta konufólki› hevur siti › longst

Sí›ani Føroya Arbei›arafelag var› stovna›, hevur ta› havt xx formenn. Fyrsti forma›urin í felagnum var Maurentius Vi›stein úr Havn.

Tann, sum hevur siti› longst sum forma›ur í Føroya Arbei›arafelag, er Ingeborg Vinther, sum er forma›ur nú. Tá i› a›alfundurin ver›ur aftur í vár, hevur hon veri› forma›ur í 21 ár.

Hon er samstundis einasta konufólk, i› hevur veri› forma›ur í Føroya Arbei›arafelag.

Annars er gunnar Petersen á Tvøroyri tann, sum hevur siti› næstlongst í formanssessinum hjá Føroya Arbei›arafelag. Hann er samstundis eisini tann einasti, sum hevur veri› forma›ur í tveimum umførum. Hann var forma›ur í tilsamans 19 ár, fyrst var hann forma›ur frá 1941-1945 og sí›ani aftur frá 1958-1973.

Annars hava formenninir í Føroya Arbei›arafelag veri› hesir:
Maurentius Vi›stein, Tórshavn 1925-1931
Johan Hendrik Rubeksen, Tórshavn 1931-1939
Joen A. Rasmussen, Tórshavn 1939-1941
Gunnar Petersen, Tvøroyri 1941-1945
Magnus Tórsheim, Tórshavn 1945-1955
Johan Hendrik Joensen, Sumba 1955-1956
Arni á Rógvu, Vestmanna 1956-1958
Gunnar Petersen, Tvøroyri 1958-1973
Johannes Olsen, Sandavágur 1973-1980
Ingborg Vinther,Vágur 1980-

Kelda: Saman tí standi, eftir Tór› Jóansson

Eg havi fingi› hetta lívi › í bló›i› vi› mó›urmjólkini

– Verkfalli› í 1987 er ta› ringasta, eg havi veri› úti fyri hesi 20 árini, eg havi veri › forma›ur í Føroya Arbei›arafelag og ta› hendi fer› eftir fer›, at dulnevnd fólk ringdu til mín á náttartí› og hóttu i› øllum møguligum, sigur Ingeborg Vinther, forma›ur í Føroya Arbei›arafelag

FORMANSLÍV
Áki Bertholdsen

Ta› stó› ongasta›ni skriva›, at IngeborgVinther skuldi blíva fakfelagslei›ari. Hóast hon hev›i fingi› fakfelagspolitikk í bló›i› vi› mó›urmjólkini, hev›i hon ongantí› ætla› sær uppí fakfelagsarbei›i›. Men tey, sum hava fylgt vi› hesi seinastu 20 árini, tey vita, at ta› skuldi ganga ø›rvísi.

Ingeborg Vinther bleiv ikki bara fakfelagslei›ari. Hon bleiv eisini ein tann litríkasti og t‡dningarmesti fakfelagslei›arin í Føroya søgu. Og hon er tann, sum hevur veri› longst forma›ur í Føroya Arbei›arafelag. Vit hava tosa› vi› hana um leyst og fast hesi árini 23 árini, hon hevur veri› virkin í fakfelagspolitikki.

Ingeborg Vinther kom í nevndina í Føroya Arbei›arafelag í 1977. Men longu á a›alfundinum í 1980 bleiv hon vald til formann, tá i› Johannes Olsen úr Sandavági ikki stilla›i uppaftur.

Og ta› arbei›i› hevur hon megna› so væl, at sí›ani hevur ongantí› veri› ivi um, hvønn limirnir í Føroya Arbei›arafelag vilja hava til formann, tí hvørja fer›, hon hevur sta›i› fyri vali›, hevur hon fingi› so dygga álitisváttan frá fundarfólkinum, at hon hevur ongantí› so frægt sum havt eitt mótvalevni.

Sostatt eru ta› nú 23 ár sí›ani, at Ingeborg Vinther kom í nevndina og Føroya Arbei›arafelag og hon hevur skjótt veri› forma›ur í 21 ár.

Tá i› hon kom í nevndina í Føroya Arbei›arafelag var hon púra fesk í fakfelagspolitikki, hon hev›i veri› nevndarlimur í Arbei›skvinnufelagnum Fjallbrú›ur í heimbygdini Vági í umlei› eitt ár. Men tey fyrstu árini, hon var nevndarlimur og forma›ur í Føroya Arbei›arafelag, var hon eisini forma›ur í Fjallbrú›ur í eini fimm ár.

– Ta› var púra av tilvild, at eg bleiv virkin í fakfelagspolitikki, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at hon plagar at vera á fundi í Fjallbrú›ur, har hon var› limur. Og henni so lík‡t, so gloymdi hon ikki at siga sína meining um tey mál, sum vóru fyri á hesum fundum. Og tey, sum kenna til felagsarbei›i í Føroyum, tey vita, at tey, sum siga sína meining, tey enda skjótt í nevnd.

Og ta› gjørdi Ingeborg Vinther eisini. Ta› var kortini trey›ugt, at hon játta›i at lata seg velja í nevnd, men eftir fleiri áheitanir, játta›i hon at stilla upp á nevndarvali - og hon var› vald.

So var› lívslei›in hjá Ingeborg Vinther løgd, tí vegurin úr Fjallbrú›ur inn í Føroya Arbei›arafelag tók, sum sagt, bara eitt ár.

Annars var ta› ikki so undarligt, at júst Ingeborg Vinther enda›i uppií fakfelagspolitikki.

– Eg eri uppvaksin í einum heimi, har ta› bleiv tosa› nógv um fakfelagspolitikk. Bæ›i pápi mín og systkin hansara vóru virkin fakfelagsfólk í nógv ár. Pápi mín var m.a. stjórnarlimur í Føroya Arbei›arafelag í eini 10 ár. Og fastur mín var vi› til at stovna Arbei›skvinnufelagi› Fjallbrú›ur í síni tí›.

Hetta var í barnaárunum hjá føroysku fakfelagsrørsluni, og tá vóru ovurhonds stór mál at taka stø›u til. ágangurin á feløgini var øgiligur og strí›i› var mangan hart. Tí var ta› ey›sæ›, at tá i› so nógv av mínum nærmastu vóru virkin fakfelagsfólk, var hetta naka›, sum fylti nógv í okkara heimi.

– So eg havi fingi› fakfelagspolitikk, og sosialistiskan politikk inn vi› mó›urmjólkini. Og heiman ífrá var› eg lærd, at ta› var ein skylda at taka lut í fakfelagspolitikki.Tí kendi eg ta› eisini sum eina skyldu at vera vi› á fundum. Men at eg beinlei›is skuldi enda í nevnd, ta› var heilt avgjørt ikki naka›, sum eg hev›i hugsa› so nógv um frammanundan, sigur hon.

Ingeborg Vinther hevur ongantí› funni› seg í at blíva hótt. Og ta› kom henni væl vi› í verkfallinum í 1987, tí tá ringdi telefonin oftani um náttina. Men ta› rein yvirhøvur ikki vi › hana

Mynd: Jens K. Vang

Bara vaksi› og vaksi›

Ingeborg Vinther sigur, at hesi 20 árini, hon hevur veri› forma›ur í Føroya Arbei›arafelag, er fakfelagsarbei›i› broytt so nógv, at ta› er ikki at kenna aftur.

– Tá i› eg bleiv forma›ur, var› skrivstovan opin tveir dagar um vikuna. Og vit vóru bara tvey fólk á skrivstovuni, eg sjálv og ein kassameistari. Tá vóru nevndarfundir eisini bara einar tvær fer›ir um ári›

– Nú er skrivstovan opin hvønn dag, og vit eru f‡ra fulltí›arstørv í felagnum. Og nevndarfundir eru hvønn mána›a, onkuntí› uppaftur oftari.

Ingeborg sigur, at eitt, sum er nógv vaksi› hesi seinastu árini, er samstarvi› vi› fakfeløg og felagskapir uttanlands. Men eisini hevur samstarvi› ímillum fakfeløgini í Føroyum ment seg nógv hesi seinastu árini. Í dag eru uppgávurnar hjá Føroya Arbei›arafelag eisini nógv vaksnar.

– Fyrr var ta› at kalla bara krónur og oyru, ta› snú›i seg um. Í dag sn‡r ta› seg sjálvandi eisini um krónur og oyru. Men ta›, sum eitur arbei›sumhvørvi og trygd og trivna›ur á arbei›splássum, hevur eisini alstóran t‡dning. Eisini ta› setir stór krøv til Føroya Arbei›arafelag, eitt nú til at útvega limunum sosialar skipanir, sum Føroya Arbei›sfelag eisini hevur arbeitt nógv vi›.

Hótt vi› einum og ø›rum

Ein annar stórur sigur, umframt líkalønin, sum greitt er frá a›rasta›ni, var ta› óvanliga drúgva og har›a verkfalli› í 1987.

– At felagi› kom heilskapa› ígjøgnum ta› verkfalli›, sum vardi í heilar tríggjar vikur, ta› sigur eitt sindur um styrkina í fakfelagnum og seiggi í arbei›sfólki kring landi›.

Hon sigur, at verkfalli› snú›i seg um, at Arbei›sgevararnir betaltu 1 % av lønini í ein eftirlønargrunn hjá Havnar Arbei›smannafelag.

– Tá i› okkara tørn var fyri, kravdu arbei›sgevararnir at fáa ávirkan á, hvussu vit brúktu hetta eina prosenti›, og teir kravdu at fáa umbo› í nevndina, sum skuldi umsita ein eftirlønargrunn og ávirkan á, hvussu okkara skipan skuldi vera.

– Hetta bleiv eitt prinsippmál fyri Føroya Arbei›arafelag, tí arbei›sgevarar skuldu ikki leggja seg út í innanh‡sis vi›urskifti hjá okkum og teir skuldu ikki blanda seg uppí, hvussu vit snikka›u eina sosiala skipan sama.

– Ta› enda›i í verkfalli, sum vardi í samfullar tríggjar vikur. Minniligast frá tí verkfallinum, er at Oyggjarvegurin var avbyrgdur í Kollafjar›ardali.

IngeborgVinther sigur, at hetta ta› har›asta verkfalli› hon hevur veri› vi› í.

–Eisini heilt personliga var hetta verkfalli› ómetaliga hart og tá vóru nógvar svøvnleysar nætur.

Hon sigur, at hesa tí›ina hendi ta› fer› eftir fer›, at dulnevnd fólk ringdu til hennara allar tí›ir á døgninum, eisini um náttina og brúkti skitin or› ímóti henni.

– Eg var› eisini meiri enn einafer› beinlei›is hótt, enntá vi› lívinum.

Men hon sigur, at hesar hóttanirnar rinu ikki vi›.

– Eg eri ískakøld fyri slíkum. Eg havi ongantí› funni› meg í hóttanum og sovor›num havi eg ongantí› lurta eftir, tí fólk, sum finna uppá slíkt, eru ikki vi› síni fullu fimm.

– Ta› var undrunarvert, at tey ymsu arbei›arafeløgini megna›u at standa so væl saman í hesum verkfallinum. Tá vóru ta› ikki øll feløgini, sum høvdu verkfalsgrunn, so hjá nógvum húskum var hetta eitt álvarsligt, fíggjarligt bakkast. Ta› vóru eisini nógv feløg, sum høvdu sett pening í virkini í fyri at skapa arbei›splass á teimum ymsu plássunum. Men kortini løgdu tey hesi virkini lamin fyri felags sakir.

Fingu ikki fri ›

Hinvegin sleppur ein fakfelagslei›ari, sum hevur siti› í 20 ár, heldur ikki undan málum, sum pína.

– Eitt av teimum málum, sum harmar meg mest, ta› er, at landsst‡ri› ikki gav okkum fri› til at seta ta› eftirlønarskipan í verk, sum vit nú hava arbeitt vi› í fleiri ár.

– Ta› byrja›i longu, tá i› Samhaldsfasti kom. Vit tóku fult undir vi› Samhaldsfasta, tí hetta var ein skipan, sum ikki gjørdi mun á fólki. Men tíverri kom hann ongantí› at virka eftir ætlan. Tí sóu vit okkum ongan møguleika, enn at fara undir okkara egnu eftirlønarskipan.

IngeborgVinther sigur, at tey vóru komin so langt, at tey høvdu gjørt eina samhaldsfasta eftirlønarskipan.

– Máli› var› lagt fyri a›alfund, sum tók fult undir vi› ætlanini. Men tá i› vit nú skulu fara til verka, kemur landsst‡ri› sum ketta upp úr høvdatrogi og vi› eini heilt a›rari loysn, har øll skulu tvingast til at betala í eina eftirlønarskipan.

– Ta› gjørdi, at vit máttu leggja alt okkara arbei›i á hyllina. Men skipanin hjá landsst‡rinum kom bara ongantí›. Avlei›ingin er, at limirnir í Føroya Arbei›arafelag hava ikki enn fingi› eina sámuliga eftirlønarskipan.

Ta› er eisini ringt hjá Ingeborg Vinther at svølgja, at politikarar skulu gera av, hvussu eftirlønarskipanin hjá Føroya Arbei›arafelag skal vera.

Mugu passa allar skógvar

Ingeborg Vinther hevur sjálv havt møguleikan at hava politiska ávirkan, tí hon sat sjálvt á tingi frá 1994 til 1998 sum umbo› fyri Verkamannafylkingina. Men hon ásannar, at ta› hev›i hon ringar royndir av og hon stilla›i ikki uppaftur í 1998.

– Ta› vísti seg skjótt, at fyri at kunna sita á tingi, er ta› ney›ugt at passa allar skógvar.

– Eg fór á ting vi› eini hugsjón, og ta› var at arbei›a fyri tey ringast staddu í samfelagnum. Men tá i› eg ikki vildi víkja frá hesi hugsjónini, var› eg fryst úti. Men ta› vildi eg heldur enn svíkja hugsjónirnar, fyri at sleppa upp í part onkusta›ni.

Ingeborg sigur, at orsøkin til, at tey fóru í holt vi› Verkamannafylkingina, var júst tann, at ta› var ongin arbei›araflokkur eftir á tingi. Og stó›u vit saman, og arbeiddu útfrá teimum hugsjónum, sum vit fóru til vali› uppá, hev›i ta› kunna bliv› ein sterkur flokkur.

Men solei›is skuldi ikki ver›a og fylkingin syndra›ist.

Ingeborg Vinther sigur, at hon fekk í hvussu so er ta› burturúr, at nú veit hon, hvussu politiska skipanin virkar og ta› var ein gó› læra, sum mangan hevur veri› hent sí›ani. So ta› var ta› vert í tann mátan.

Ongin vilji

Annars heldur Ingeborg Vinther, at ta› er ein syrgilig søga, at øll arbei›arafeløgini ikki kunnu semjast um at leggja saman í eitt felag.

– Høvdu vit ta›, hev›i ta› styrkt feløgini heilt munandi. Ta› hevur nakrar fer›ir veri› roynt at fáa fakfeløgini at standa saman um eitt felag, men ta› er miseydna› hvørja fer›.

Tó var ta› heilt vanligt fyrr, at øll arbei›arafeløgini samráddust saman um n‡ggjar sáttmálar.

Ingeborg Vinther sigur, at ein orsøk til, at ta› er miseydnast, er, at tey stóru feløgini eru bangin fyri, at tey smáu feløgini koma at hava ov nógv at siga. Hinvegin stóra tey smærru feløgini fyri, at tey stóru feløgini fara at taka alt ræ›i í einum slíkum felagsskapi.

Ingeborg Vinther heldur, at stutt sagt er ta› spja›ingarandin, sum mangan kemur til sjóndar í Føroyum, sum ger seg galdandi. Hon heldur, at var vilji til sta›ar, hev›i ta› bori› til at funni› eina skipan, har i› bæ›i tey størru og tey smærru feløgini høvdu trivust í einum stórum felagsskapi, uttan at annar parturin føldi seg køvdan av hinum.

– Men mínar royndir eru, at at viljin til samstarv er ikki til sta›ar.

Fakfeløgini hava tó eitt ávíst samstarv í Sjeymannabólkinum og ta› er ein stór styrki í nógvum málum.

Vegna plásstrot kemur seinasti parturin av samrø›uni vi› Ingeborg í bla›i› t‡sdagin

Vóru hart ímóti at konufólk fingu somu løn sum mannfólk

FORMANSLÍV
Áki bertholdsen

Ingeborg Vinther sigur tá i› hon kom í nevndina í Føroya Arbei›arafelag, var tann stóra, fakfelagsliga avbjó›ingin, at útvega konufólki somu tímaløn sum mannfólk fyri sama arbei›i.

– Tá var stø›an tann, at ta› var stórur munur á tímaløninni hjá mannfólki og konufólki. Mannfólk fingu millum tvær og tríggjar krónur meiri um tíman, enn konufólk fingu fyri sama arbei›i.

– Hinvegin fingu konufólk fulla løn tá i› tey vóru 16 ár, men mannfólk fingu ikki fulla løn, fyrrenn tey vóru fylt 17 ár.

– At fáa hetta í rættlag, so at konufólk og mannfólk fingu somu løn fyri sama arbei›i, var ta› máli›, sum var› ra›fest nummar eitt fyrstu fer›, eg var vi› í sáttmálasamrá›ingum í 1977.

Hon sigur, at ta› var longu íme›an hon arbeiddi á flakavirki í Vági, at hon javnan ilska›ist inn á, at ma›urin, sum arbeiddi undir li›ini á henni, skuldi fáa nógv meiri í løn, enn hon sjálv fekk.

– Tá i› eg so kom í nevndina í Føroya Arbei›arafelag, setti eg mær fyri, at hetta var ta› fyrsta, sum eg skuldi arbei›a fyri at fáa í rættlag.

– Men tá i› so Føroya Arbei›arafelag og hini feløgini, løgdu síni sáttmálakrøv fram hetta ári›, var sama løn til konufólk, sum til mannfólk, longu eitt av krøvunum.

– Hetta vór›u har›ar samrá›ingar, tí summir arbei›sgevarar vildu ikki hoyra talan um, at gjalda konufólki somu løn sum mannfólki.

– Ta› kom ikki so óvart á okkum, at arbei›sgevararnir vóru ímóti at hækka lønina hjá konufólki.

– Meiri óvænta› var ta›, at eisini í fakfelagsrørsluni var hør› mótstø›a ímóti hesum. Ikki minst vóru nógv mannfólk ímóti, at konufólk skuldu fáa líka høga løn, sum teir. Teir hildu, eins og arbei›sgevararnar, at ta› var órímiligt, at konufólk skuldi fáa líka nógva løn sum mannfólk, tí tey arbeiddu ikki ta› sama, orka›u ikk so væl at lyfta o.s.fr.

Arbei›sgevararnir hildu sjálvsagt eisini, at teir høvdu ikki rá› til at hækka lønina so nógv.

Hon sigur, at endin var eisini, at samrá›ingarnar slitna›i.

Jógvan Sundstein var semingsma›ur tá, og so mátti hann uppí. Ta› enda›i vi›, at hann leg›i eitt uppskot fyri partarnar, sum seg›i, at lønin skuldi útjavnast so lí›andi, so at øll fingu somu løn í 1981.

Hinvegin skuldu konufólk ikki fáa fulla løn, fyrrenn tey vóru 17 ár, akkurát sum mannfólkini.

Eisini hesum vóru nógv fakfelagsfólk ímóti, tí tey hildu, at ta› var nógv fyri, at ungar gentur, sum arbeiddu í summarferium fyri at forvinna sær nøkur oyru, ikki skuldi fáa fulla løn.

Ingeborg Vinther sigur, at ta› skerst ikki Jógvan Sundstein gjørdi eitt megnar arbei›i› fyri at sannføra allar partar um, at tí›in var farin frá, at munur skuldi vera á lønunum hjá mannfólki og konufólki.

Endin var eisini, at ta› lønin uppskoti› um somu løn fyri sama arbei›i›, bleiv gó›tiki› av øllum pørtum og somulei›is at konufólk ikki skuldi fáa fasta løn, fyrrenn tær vóru 17 ár.

Hon minnist, at tey fingu manga skoluna omanyvir seg, eisini frá arbei›smonnum, fyri, at spurningurin um somu løn fyri sama arbei›i›, var› komi vi› í sáttmálan.

Ta fer›ina vóru ta› fleiri arbei›arafeløg samráddust saman og ta› eydna›ist til fulnar at standa saman. Og semja var um, at taka av uppskotinum fyri at gagna heildini, so heldur lata ta› fara, at tær 16 ára gomlu genturnar ikki longur skuldi fáa fulla løn.

– Feløgini, sum samráddust saman tá, vóru Føroya Arbei›arafelag, bæ›i feløgini í Klaksvík, og í Havn, umframt Fiskepigernes Fagforening, sum ikki var blivin limur í Føroya Arbei›arafelag tá. Og ta› gav okkum eina vekt, sum vit ikki høvdu havt, um vit samráddust hvør sær.

– Uttan iva hjálpti ta› okkum eisini væl, at bæ›i í Fiskepigernes Fagforening og í Havnar arbei›skvinnufelag, vóru konufólk formenn, tær vóru ávikavist Ásla Jespersen og Andrea Árting.

Hon sigur, at hetta er ein av teimum stóru sigrunum hjá arbei›arafeløgunum ta› tí›ina, hon hevur veri› uppií.

-Góðir brúktir frá REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 174.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6
Skrás.: 19-11-98
Km.: 15.000
Prísur: 124.600,-Garanti**

TOYOTA AVENSIS 2,0 T DIESEL
Skrás.: 21-12-98
Km.: 38.000
Prísur: 162.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 114.600,- Garanti**

TOYOTA AVENSIS 2,0 D-4 DIESEL
Skrás.: 06-04-00
Km.: 8.000
Prísur: 200.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA
Skrás.: 01-05-95
Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti*
Sýnaður 12-99

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear
Skrás.: 13-06-96
Km.: 82.000
Prísur: 119.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 57.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SEDAN
Skrás.: 24-08-95
Km.: 112.000
Prísur: 110.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 STATION
Skrás.: 14-12-95
Km.: 62.000
Prísur: 92.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SEDAN
Skrás.: 12-04-95
Km.: 71.000
Prísur: 118.600,- Garanti*

TOYOTA CAMRY 2,0 Gli
Skrás.: 10-07-91
Km.: 129.000
Prísur: 70.600,-
Sýnaður 10-00

TOYOTA CARINA 1,6 XLi L/B
Skrás.: 23-04-96
Km.: 52.000
Prísur: 115.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-
Sýnaður 06-99

TOYOTA CARINA E 1,6 CDX
Skrás.: 18-10-96
Km.: 77.000
Prísur: 108.600,- Garanti*

HONDA CIVIC 1,8 VTI
Skrás.: 01-12-97
Km.: 67.000
Prísur: 160.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN
Skrás.: 30-05-94
Km.: 109.000
Prísur: 89.600,- Garanti*
Sýnaður 03-00

HONDA ACCORD 1,8
Skrás.: 01-11-97
Km.: 53.000
Prísur: 142.600,- Garanti*

Sosialurin - 211200

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90
Km.: 122.000
Prísur: 52.600,-

PEUGEOT 406 1,9 T-DIESEL
Skrás.: 10-01-96
Km.: 80.000
Prísur: 138.600,- Garanti*
Sýnaður 05900

TOYOTA CARINA 1,6 XLi
Skrás.: 11-06-91
Km.: 108.000
Prísur: 48.600,-
Sýnaður 09-00

OPEL ASTRA 1,7 TURBO DIESEL
Skrás.: 31-07-96
Km.: 105.000
Prísur: 95.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA H/B
Skrás.: 27-04-99
Km.: 21.000
Prísur: 135.600,- Garanti**

HYUANDAI ACCENT 1,5
Skrás.: 02-01-98
Km.: 25.000
Prísur: 85.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B
Skrás.: 30-09-98
Km.: 52.000
Prísur: 115.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 13-12-95
Km.: 87.000
Prísur: 78.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 05-03-99
Km.: 34.000
Prísur: 117.600,- Garanti**

FORD ESCORT 1,6
Skrás.: 22-09-95
Km.: 87.000
Prísur: 74.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 29-12-98
Km.: 20.000
Prísur: 120.600,- Garanti**
Sýnaður 10-00

FORD ESCORT 1,6 5 HURDAR
Skrás.: 06-06-95
Km.: 82.000
Prísur: 72.600,-

* Brúktir bílar yvir 75 000 kr. verða seldir við BRUKTBILAVATTAN
** TOYOTA bílar hava 3 ára garanti frá trysta skrás. dato

FORD ESCORT 1,8 SPORT
Skrás.: 01-08-95
Km.: 43.000
Prísur: 74.600,-
Sýnaður 12-00

VØRUVOGNAR

TOYOTA HILUX 4x4 V/HARDTOP
Skrás.: 18-12-96
Km.: 91.000
Prísur: 138.600,- Garanti*

NISSAN KING VAN
Skrás.: 29-09-95
Km.: 85.000
Prísur: 80.600,- Garanti*

TOYOTA HILUX 4x2 PICK-UP
Skrás.: 28-08-90
Km.: 205.000
Prísur: 46.600,-

MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL
Skrás.: 11-05-00
Km.: 9.000
Prísur: 138.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL VAN
Skrás.: 16-12-97
Km.: 63.000
Prísur: 108.600,- Garanti*

MITSUBISHI PAJERO
Skrás.: 1988
Km.: 140.000
Prísur: 29.600,-

AVHEINTINGARTILBOÐ

VW TRANSPORTER V/ DUP. KABINU
Skrás.: 17-02-87
Km.: 190.000
Prísur: 5.600,-

VW LT 35
Skrás.: 30-06-93
Km.: 290.000
Prísur: 12.600,-
Sýnaður 02-98

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-fri. 8.00-17.00
TOYOTA Reyni Service TOYOTA TOYOTA
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040